## Russar skipa pólherdeild

Russland ætlar sær at skipa eina serliga herdeild, sum skal standa tilbúgvin at brúka í økinum kring Norðpólin, um tað gerst neyðugt. Russar hava víst altsamt størri áhuga fyri økinum við Norðpólin, sum verður hildið at fjala heimsins størstu olju- og gassgoymslu undir havbotninum. Harafturat hevur økið veksandi áhuga, nú ísurin í póløkinum minkar. Men russar eru ikki einsamallir, tí USA, Kanada, Noreg og Danmark tilskila sær eisini rættindi í póløkinum. Hernaðarfrøðingar vænta kortini ikki, at tann stóri áhugin fyri økinum fer aty elva til hernaðardubbing har.



## Byrsumaður á røktarheimi

Ein maður skeyt í gjár minst átta fólk á einum røktarheimi í amerikanska statinum North Carolina. Tann vápnaði maðurin fór inn á eitt røktarheim í tí lítla býnum Carthage í North Carolina. Har skeyt hann átta fólk. Seks teirra doyðu beinanvegin, og hini bæði doyðu á sjúkrahúsinum. Løgreglan sigur, at drápsmaðurin bleiv tikin eftir skotbardaga við løgregluna. Enn hevur løgreglan ikki sagt, hvør drápsmaðurin er. Røktarheimið í Carthage hevur 90 seingjarpláss og viðger yvirhøvur fólk, sum hava Alzheimer, skrivar AP.

# 100 lesandi møttu p




*Tað er Norðuratlantsbólkurin, sum skipar fyri afturvendandi studentadegnum á Christiansborg*

**Eisini framstandi vinnulívsmenn úr bæði Føroyum og Grønlandi luttóku á Studentadegnum á Christiansborg. Sjálvt tiltakið stóð tíverri í skugganum av flottu og fjølbroyttu skránni, Norðuratlantsbólkurin borðreiddi við**

STUDENTADAGUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Christiansborg, Keypmannahavn:** Norðuratlantsbólkurin hevur í tíðindaskrivi boðað frá, at eini 130 lesandi og onnur áhugað fara at luttaka á Studentadegnum, bólkurin hevur skipað fyri í Landstinginum á Christiansborg. Dyrnar lótu upp klokkan 12 og sjálvt tiltakið er sett at byrja klokkan 13.00.

Nú er klokkan farin av 13.00, salurin telur valla meiri enn hálvthundrað fólk, og formaður fólkatingsins Thor Pedersen bjóðar vælkomin. So fara dyrnar upp og ein riðil av ungdómum kemur inn og sessast. Talan gerst tó ongantíð um 130 luttakandi í Landstingssalinum, men lá talið heldur nærri teimum 100 – nøkulunda javnt býtt millum føroyingar og grønlendingar.

### Løkke lokkaði

Skráin fyri fríggjadagin á Christiansborg er bæði long og fjølbroytt. Tíggju ymisk nøvn skulu siga sítt teir fýra tímarnar tiltakið er, umframt at spurningar eisini skulu svarast og tey luttakandi lesandi skulu kjakast sínámillum um, hvat skal fáa tey at venda nøsina aftur til heimlandið eftir loknan lesna.

Í mun til í fjør vóru vinnulívsfólk eisini partur av skránni á Studentadegnum. Christian Nagata, stjóri í Nema, var føroyska umboðið og stóð hann fyri mest áhugaverda og ítøkiligaupplegginumyvirhøvur. Meir um hetta seinni.

Av politiskum nøvnum vóru Høgni Hoydal og Heðin Mortensen einastu politisku nøvnini. Fyrst nevndi umboðandi Norðuratlantsbólkin saman við Lars-Emil Johansen og Julianne Henningsen, meðan Heðin Mortensen umboðaði Tórshavnar kommunu.

Størsta og mest aktuella navnið var danski fíggjarmálaráðharrin Lars Løkke Rasmussen úr flokkinum Venstre, sum verður næsti danski forsætisráðharrin, um Anders Fogh Rasmussen tekur við starvinum sum aðalskrivari í Nato.

Line Barfod frá Enhedslisten og Julie Rademacher frá Socialdemokraterne vóru hini bæði donsku politisku umboðini.

Skráin var nakað væl øðrvísi enn í fjør, tá tað vóru politikarar burtur av, sum hildu upplegg. Men aftur í ár eigur Norðuratlantsbólkurin rós uppiborið fyri at fyriskipa einum slíkum tiltaki, har føroyski og grønlendski ungdómurin sleppur á tal við politiska toppin í ríkisfelagsskapinum, umframt framstandandi vinnulívsfólk.

Rúgvismikla skráin hevði tó ta slagsíðu, at einans tíggju minuttir vórðu settir av til hvørt upplegg. Av tí sama vóru flestu uppleggini tunn og av lítlum týdningi. Spell, tá so nógv og spennandi nøvn vóru savnað til sama tiltak.

### Tosaðu til síni

Felags fyri næstan øll uppleggini var, at politikarin ella vinnulívsmaðurin vendi sær til sítt fólk. Undantakini vóru Line Barfod og Lars Løkke Rasmussen, sum tosaðu í breiðum vendingum um týdningin av útbúgving, at ríkisfelagsskapurin átti at virka sum ein eind á hesum øki.

Hini vendu sær til síni. Tað vil siga, at Julie Rade-



*Ung lesandi saman við Høgna Hoydal*

